

# West Hercules-eigarin strikar avtalu fyri sjey milliardir krónur

**Jógvan Hugo Gardar**

13.02.2015 - 11:11

Oljan.fo

Seadrill, ið millum annað eigur boripallin West Hercules sum lá í Føroyum í heyst, kann fáa ein undir vangan í Brasil. Í morgun er komið fram at fyritøkan strikar eina avtalu um at leiga boripallar til brasilianska Petrobas, fyri góðar sjey milliardir krónur.

Hetta stendur í eini frágreiðing sum Seadrill hevur sent til keypsskálan í morgun. Seadrill skrivar at tey royna at finna eina góða fíggjarliga loysn saman við Petrobas í hesum málinum.

Petrobas er rakt av eini risastórari korrupsjónsgølu, ið nýliga kostaði aðalstjóranum starvi. Útlendsk oljufeløg, og ikki minst útgerðarfeløg, sita nú og bíða fyri at vita hvat sum kemur at henda í Petrobas.

Petrobas er undir illgruna í eini korrupsjónsgølu fyri meir enn 60 milliardir krónur. Gølan rakar fleiri av stóru fyritøkunum í Brasil. Petrobas er undir illgruna fyri at hava tikið í móti mutri frá útlendskum oljufeløgum, fyri at geva hesum góðar avtalur í Brasil. Gølan kann fáa avleiðingar fyri stórar útbyggingar í Brasil.